

### Amnesty aðalfund

Aðalfundurin hjá Amnesty International, Føroya deild verður á Landsbókasavninum hósvkøldið 15. apríl kl. 1930. Skráin verður sambært lógir felagsins. Aftan á fundin greiðir Elin Reinert Planck frá arbeiðinum hjá Kvinnuhusinum.




### Annika á Lofti á Jinx

Frá 1. apríl til 30. apríl fer Annika á Lofti at hava søluframsýning á Jinx.

Annika á Lofti er 20 ára gomul, hon er úr Sandavági, og hava málningar hennara m.a. fyrr verðið við á Vestanstevnusýningini og Ólavsøkuframsýningini.

### Almennur fyrilestur á Fróðskaparsetrinum

Fimti fyrilesturin í røðini 'Modernaðir teoretikarar', sum Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Fróðskaparfelag skipa fyri í vár, verður mikukvøldið 31. mars kl. 20 í Ovastovu í Nóatúni.

Erika Hayfield, Ph.D-lesandi á Napier University í Edinburgh, fer at halda fyrilesturin »Børn og forbrúk.«

Fyrilesturin lýsir nøkur av høvuðsevnunum viðvíkjandi børnum og forbrúki. Hesi eru í høvuðsheitum samleiki, marknaðarføring (serliga lýsingar og fjølmiðlar), merkivørur, og fatanin hjá børnum av at vera brúkari. Eisini verður hugt at etisku spurningunum í marknaðarføring, ið vendir sær móti børnum. Dømi vera úr Ph.D-ritgerð hennara, millum annað dømi um munin millum tvey øki í Skotlandi, har annað vanliga verður hildið at vera múgvandi og hitt ikki.

Erika Hayfield er útbúgvin BA (hons) í Marketing Managament og Postgraduate Diploma frá Chartered Institute of Marketing frá Napier Universitetinum í Edinburgh. Hon skrivar í løtuni Ph.D-ritgerð um marknaðarføring, ætlað børnum í barnagarðsaldri og til umleið 12 ára aldur.

Skráin fyri fyrilestrarøðina er henda:

31. mars Erika Hayfield: »Børn og forbrúk«

14. apríl Hans Andrias Sølvará: »Vald, vitan og framburður í verkinum hjá Michel Foucault«

26. mai. Jonathan Schwartz: »Max Weber kallar á teg! - Hví protestantiska siðalæran og sál kapitalismunnar (1904-5) eru klassikarar.«

Allir fyrilestrarnir vera klokkan 20 í Ovastovu í Nóatúni.

### Sernámsdepilin skipar fyri skeiði

30. og 31. mars skipar Sernámsdepilin fyri skeiði í Læraraskúlanum.

Úr Svøríki eru komnar skeiðshaldarar Irene Johansson og Barbro Svensson. Irene er professari í málljóðfrøði og sernámsfrøði við Karlstad Universitet í Umeå. Barbro er serlærari og musikkterapeutur í Norrkoping.




Evnið er »Karlstadmodellen«, ið er ein arbeiðsháttur at stimbra málfatan og evni hjá fólki við serligum tørvi at samskifta. Hesin hátturin byggir á hugburðin um, at ein felags fatan hjá øllum, ið eru um barnið, má vera grundarlag undir miðvísum samstarvi.

Teir 50 luttakararnir eru pedagogar, foreldur, serlærarar og lærarar

# Samfelagsstevna í Siloa í Fuglafirði á Páskum

SAMFELAGSSTEVNA
*Tíðindaskriv*

Aftur í ár verður samfelagsstevna á páskum í Siloa í Fuglafirði og í Ítróttarhøllini á Kambsdali. Møtir verða í Siloa skírisdag 8. apríl og langafríggjadag 9. apríl kl. 18.

Leygardagin 10. apríl verður farið út í Ítróttarhøllina á Kambsdali. Byrjað verður við einum sonevndum temamøti kl. 15. Evnið, sum viðgjørt verður, er: »So kemur tá trúgvin av tí, sum talað verður« - tín ábyrgd í samkomuni. Páll Poulsen og Klæmint Eliasen fara at viðgera evnið.

Leygarkvøldið kl. 20 verður ein evangelisk sangløta, har sangkórið í Siloa og onnur fara at syngja. Eisini verður nógvur felagssangur og ein stuttur evangeliskur boðskapur.

Tvey familjumøti verða á Kambsdali á páskum, fyrra páskadag og 2. páskadag, báðar dagarnar kl. 16. Hesi møti eru á ein serligan hátt ætlað allari familjuni, har ymiskt verður bæði til børn og vaksin. Har verður nógvur góður sangur, søga til børnini og annað.

Umframt tað, sum nevnt er omanfyri, verða tvey evangelisk møti í Ítróttarhøllini á Kambsdali. Tey verða páskadag og 2. páskadag kl. 18.

Tvær ferðir verður borðreitt við nátturða hesar dagar í Ítróttarhøllini. Beint eftir bæði familjumøtini páskadag og 2. páskadag - umleið kl. 17 - fáa øll, ið eru til staðar, nátturða. Hetta verður gjørt bæði av praktiskum orsøkum, og fyri at fundarfólkið kann hava møguleika at hugna sær og práta saman.

Tvey av kvøldunum, leygarkvøldið og sunnukvøldið - kl. 22 - verður opið hús í Siloa. Har verður nógvur sangur - bæði felagssangur og framførdur sangur - vitnisburðir og tala. Eisini verður hugnaløta við drekkamunni. Hesum løtum skipa tey ungu fyri, men tey siga at øll eru vælkomin, bæði ung og eldri.

Fyrireikararnir bjóða øllum at vera hjartaliga vælkomnum til øll hesi møti.



*Á páskum verður samfelagsstevna í Siloa í Fuglafirði og í ítróttarhøllini á Kambsdali*

# Lívmóðurhálskrabbi nærum útruddaður

Triðji hvør dani fær krabba og fjórði hvør fer at doyggja av krabbameini.

Hetta kemur fram í Ugeskrift for læger. Niðurstøðan tekur støði í teimum frágreiðingum, sum verða latnar donsku krabbaskránni.

Men tað eru eisini eydnusøgur millum mongu tølini. Tá kvinnur í dag verða screenaðar triðjahvørt ár, hevur tað nærum eydnast at útrudda lívmóðurhálskrabba, tí hann verður funnin í góðari tíð.´

Í 1970 vóru 40 tilburðir millum 100.000 kvinnur. Nú fáa undir 5 av 100.000 sjúkuna.

**rs**

# Ungdómur í vinarbýasamstarvi

NORØNAFELAGIÐ
*Tíðindaskriv*

Broytingar í kommunum og luturin hjá teimum ungu í vinarbýasamstarvinum eru evnini á vinarbýarstevnuni í Kalmar í Svøríki vikuskiftið 6. til 8. august í ár.

Á skránni eru eisini víðkanin hjá ES og hvussu hon ávirkar vinarbýasamstarvið, og góð dømi um vinarbýasamstarv í Norðurlondum verða tikin fram.

Føroyingar eru sjálvandi vælkomnir at vera við. Freistin at boða frá er til 1.juni. Luttøkan kostar 1.500 kr. umframt innivist og ferðina aftur og fram.

Umsóknarblað fæst hjá Norrøna Felagnum í Føroyum, J. Paturssonargøtu 24, 100 Tórshavn, tlf. 217999.

Norrøna Felagið hevur aðalfund í Jákupsstovu, J. Paturssonargøtu 24, mikudagin 31. mars kl.20.00. Millum annað nevndarval er á skránni.

# Klárt at kappast um bestu songrøddina

– Einki ár uttan Ársins Songrødd. Heldur ikki 2004, siga fyrireikararnir, sum eru farnir undir at leggja kappingina til rættis. Teir eru komnir so langt, at teir fara at lata upp fyri tilmelding til kappingina sum byrjar 17. apríl í høllini á Kambsdali.

Fólk kunnu nú tekna seg til kappingina á heimasíðuna www.songroddin.com ella ringja/SMS´sa á 22 51 63.

Tað er Konto-Inn ið er høvuðsstuðul og Trendfloor sum stuðlar Ársins Songrødd2004.






# Sosialurin ger nú eisini útvarp

**Í dag fer fyrsta tíðindasendingin av Sosialinum á Argjum í luftina. Blaðið fer komandi árið at gera tíðindasendingar á Rás 2**

MIÐLAHÚS
*Eirkur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í dag fer Sosialurin at senda útvarpstíðindi.

– Vit hava gjørt avtalu við Rás 2 um at gera tíðindasenginarnar hjá rásini komandi árið, og fer fyrsta sendingin úr Miðlahúsinum hjá Sosialinum á Argjum í luftina í dag kl 12, sigur Jan Müller, blaðstjóri.

Miðlavirksemið er broytt nógv seinastu árini. At Sosialurin nú eisini fer at senda útvarp, er so bara enn eitt stig á leiðini.

Longu í 1996, tá internetið gjørdist veruleiki í Føroyum, royndi Sosialurin seg so smátt við tíðindum á netinum, og síðani 1997 hevur InternetSosialurin verið ein náttúrligur partur í miðlavirkseminum hjá Sosialinum.

Seinastu árini hevur blaðið eisini skrivað tíðindini til www.portal.fo hjá Føroya Tele, sum er Føroya nógv mest vitjaða heimasíða.



*Hans Kárason Mikkelsen fer at lesa tíðindi á Rás 2 fyrstu tíðina*

*Mynd: Jonhard Hammer*

### Øðrvísi tíðindi

Tað verður Eyðun Klakkstein, journalistur, sum fer at leggja tíðindasendingarnar á Rás 2 til rættis, og fyrstu tíðina verður tað Hans Kárason Mikkelsen, sum verður útvarpsvertur.

– Tíðindini á Rás 2 skulu vera eitt alternativ til tíðindini hjá Útvarpi Føroya. Vit fara ikki at kopiera útvarpið, men fara at gera øðrvísi tíðindi, sigur Eyðun Klakkstein.

– Útvarpið hevur eina góða og breiða tíðindaflatu, ið fevnir víða. Vit fara at gera frísk tíðindi, og fara ikki at leggja dent á tungar politiskar søgur, sum kanska ongan týdning hava í veruleikanum, men byggja á meiningar hjá ávísum fólkum – vit fara at tora at velja, sigur hann.

Seinastu árini hevur Sosialurin breitt virksemið kring landið við lokalredaktiónum í Klaksvík, í Saltangará, í Sandvík og í Sandavági. Hetta er gjørt fyri at koma borgarunum nærri, og er hetta eisini ætlanin við tíðindasendingunum á Rás 2, at koma nærri vanliga fólkinum.

– Nærleikin hevur stóran týdning, og vit fara at gera nógv burtur úr at tosa við vanliga fólkið, sigur Jan Müller.

### Mennandi samstarv

Tað verða sjálvandi tíðindini hjá Sosialinumm, sum verða grundarlagið undir tíðindunum á Rás 2. Men Sosialurin verður greiddur til prentingar á middegi. Tí verða tað fleiri tíðindi, ið kunnu fyljgast upp í útvarpssendingunum, sum sjálvandi eisini fara at taka støði í tíðindum, sum onnur framleiða, bæði útvarp, sjónvarp og Dimmalætting.

– Vit vænta at fáa gott samstarv við nýggja samstarvsfelagan, so hetta kann gagna øllkum kring landið, sum hoyra Rás 2, og vit vænta eisini, at hetta fer at leggja lunnarnar at menna Sosialinum sum eitt miðlahús við alskyns fjølbroyttum miðlavirksemi – og Rás 2 sum eina góða útvarpsstøð, sigur Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum.




*Hans Kárason Mikkelsen og Eyðun Klakkstein fyri reika seg til fyrstu tíðindasendingina. Sosialurin hevur innrætta studio í blaðhúsinum á Argjum*

*Mynd: Jonhard Hammer*

### Teldan stjelur svøvnin frá børnum

Børn, sum hava teldu ella playstation á sovikamarinum, sova ov lítið, vísir ein ensk kanning, sum granskarar frá Oxford Universiteti hava gjørt.

Elektronikkurin stjelur tíðina frá svøvninum, skrivar BCC Online. Ein av granskararunum, dr. Luci Wiggs, sigur, at tað er óvíst, hvørji langtíðarárin henda gongdin hevur á sálarligu og kroppsligu vælveruna hjá børnum.

Men vit vita, at sova børn illa ella í ov fáar tímar, kann tað skaða heilsuna, teirra akademisku avrik og sálarligu heilsu, sigur Luci Wiggs.

Aftrat telduni og spælimaskinum, er fartelefonin hjá børnunum eisini við at gerast ein trupulleiki fyri svøvnin. Tá mamma og babba hava sagt góða nátt og sløkt ljósið, skriva børnini sms undir dýnuni.

**rs**

### Lærarin má taka ræðið

Tey vaksnu mugu aftur taka ræðið í skúlunum. Misskilt tolsemi hevur ov leingi latið næmingarnar siga, hvar skápið skal standa.

Ein kanning, sum fólk frá miðstøðini fyri atferðargransking á háskúlanum í Stavanger hava gjørt, vísir, at næmingar vilja hava greiðar, avgjørdar og reglufastar lærarar.

Úrslitini frá eini verkætlan í 4 skúlum í Oslo vísir, at avgjørdir og greiðir lærarar, umframt at minka um happingina millum næmingar, eisini gera undurverk fyri dissiplin og bindindi.

Sigrun Ertesvåg, sum hevur ábyrgdina av kanningini, trýr uppá eina strangari flokksleiðslu, men tað merkir tó ikki, at vit eiga at seta pening av til nýggj spanskrør, sigur hon við norska Aftenbladet 29. mars.

**rs**